Álit

í

løgtingsmáli nr. 18/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Oljuískoyti til húski í 2022)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Sólvit E. Nolsø, hevur lagt málið fram 30. september 2022, og eftir 1. viðgerð tann 7. oktober 2022 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. oktober 2022.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri oljufeløgini Magn og Effo, Samtak og Fakfelagssamstarvið, Reyða Kross Føroya, MEGD saman við Astma/Allergifelagnum og landsstýrismannin í almannamálum, Sólvit E. Nolsø, saman við Almannaverkinum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Trivnaðarnevndin heldur, tað er umráðandi at fáa málið avgreitt, so útgjalding kann henda skjótt. Upplýst er fyri nevndini, at eftir at uppskotið er samtykt, fer Almannverkið at lýsa í miðlunum, so umsóknir kunnu koma skjótt inn. Eftir tað ganga uml. 2-3 vikur, til útgjaldingar kunnu byrja.

Nevndin hevur undir viðgerðini fingið upplýst, at stór óvissa valdar um oljuprísin í komandi tíðum. Alt eftir hvørjar fortreytir verða brúktar, koma greinarar til alt frá munandi hækking og til 30% lækking í oljuprísinum.

MEGD hevur undir viðgerðini eftirlýst betri hagtøl innan sosiala økið. Landsstýrismaðurin segði, at tey fara at arbeiða við hesum. Hagtøl kunnu tryggja, at avgerðir kunnu takast á meira nágreiniligum og málrættaðum grundarlagi.

Upphæddin, ið upprunauppskotið leggur upp til, er ein eingangsupphædd á 7.000 kr. Útrokningin er roknað út frá tí, at oljuprísurin fyri húsarhald er øktur á leið 1.000 kr. um mánaðin síðan februar, og harvið er upphæddin faldað við 7 fyri teir 7 mánaðirnar frá februar til september. Einki bendir á, at støðan fer at betrast komandi mánaðirnar. Tí heldur nevndin, at upphæddin eigur at verða roknað fyri allar mánaðirnar í árinum síðani februar. Nevndin skjýtur tí upp, at eingangsupphæddin verður hækkað úr 7.000 kr. upp í 10.000 kr.

Trivnaðarnevndin heitir á landsstýrið um at fylgja væl við støðuni og hava uppskot klár, ið tryggja livikorini, serliga hjá teimum við lág- og miðalinntøkum, og hava uppskot klár, um støðan stendur við og/ella versnar.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 2 verður í § 2 b, stk. 1 “7.000 kr.” broytt til: “10.000 kr.”.

Viðmerkingar:
Til nr. 1
Ískoytið verður hækkað úr 7.000 kr. upp í 10.000 kr.

Við hesi broyting tekur Trivnaðarnevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 19. oktober 2022

Jørgen Niclasen formaður	Sirið Stenberg næstformaður	Jacob Vestergaard
Hervør Pálsdóttir	Eyðgunn Samuelsen	Frimodt Rasmussen
	Edva Jacobsen	